# Fíggjarlógin fjalir veruleikan

**Tjóðveldisflokkurin almannakunngjørdi fríggjamorgunin alternativu fíggjarlógina hjá flokkinum. Flokkurin heldur, at fíggjarlógin hjá samgonguni, ið er til viðgerðar í tinginum í løtuni, fjalir veruleikan**

ALTERNATIV FÍGGJARLÓG
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum kunnugt vísir fíggjarlógin fyri 2006, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, hevur lagt fyri tingið eitt hall upp á 219 milliónir krónur. Sambært Tjóðveldisflokkinum er veruliga hallið tó væl hægri.

### Útreiðslur uttan fyri fíggjarlógina

Í hesum sambandi vísir flokkurin á, at til dømis er ein útreiðsla upp á 50 milliónir til Hovstunnilin lagdar uttan fyri fíggjarlógina í eitt partafelag, hóast talan er um eina almenna útreiðslu.

Somuleiðis sigur Tjóðveldisflokkurin, at tær útreiðslur, ið standa av vegagerð í Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin, heldur ikki eru tiknar við í fíggjarlógini, og tí vísir fíggjarlógaruppskotið hjá samgonguni ikki tað veruliga roknistykkið fyri samfelagið Føroyar 2006.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at uppskotið hjá samgonguni hevur eitt óneyðuga stórt hall, og soleiðis hevur tað verið øll árini undir sitandi samgongu.

### Uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum vísir minni hall

Alternativa fíggjarlógaruppskotið hjá størsta andstøðuflokkinum hevur tó eins og uppskotið hjá samgonguni eitt hall, men uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum hevur eitt hall, sum er 66,5 milliónir minni enn tað, sum nú verður viðgjørt í tinginum.

Millum størstu sparingar, ið Tjóðveldisflokkurin hevur í sínum uppskoti, eru eitt nú tær 20 milliónirnar, sum skulu nýtast til seinastu umbyggingarnar av tinghúsinum komandi ár. Eisini heldur flokkurin, at tær 2,5 milliónirnar, ið skulu nýtast til eitt løgmanssæti í Hoyvík eiga at verða strikaðar.



*Undirskotið á alternativu fíggjarlógarini hjá Tjóðveldisflokkinum er 66,5 milliónir minni enn tað hjá samgonguni.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Skattalættin rakar tey skeivu

Nógv umrøddi skattalættin upp á 60 milliónir krónur, ið samgongan hevur tikið við í sínari fíggjarlóg, ger bara gjónna millum rík og fátøk í Føroyum størri, heldur Tjóðveldisflokkurin.

- Okkara útrókningar vísa, at tey, sum hava eina inntøku upp á umleið 500.000 krónur árliga, fáa ein skattalætta upp á slakar 40.000 krónur. Hinvegin fær arbeiðarin við eini inntøku upp á einar 200.000 krónur árliga bert eini 4.000 krónur í skattalætta. Við teimum øktu avgjøldunum merkir hetta, at arbeiðarin í veruleikanum fær øktar útreiðslur, meðan tey við høgu inntøkunum fáa meiri pening millum hendurnar. Hetta ger gjónna millum rík og fátøk í Føroyum bara enn størri, og tað hevur ein tendensur undir sitandi samgongu, heldur flokkurin.

### Raðfestingin líkist tí hjá samgonguni

Tað er tó ikki á øllum økjum, at Tjóðveldisflokkurin er so ósamdur við sitandi samgongu. Tá ið hugt verður at hvørji mál, ið flokkurin raðfestir hægst, so eru hesi ógvuliga meinlík tey mál, ið samgongan hevur raðfest.

Sum dømi um hetta kann nevnast, at bæði samgongan og Tjóðveldisflokkurin eru samd um at raðfesta útbúgving, gransking og mentan høgt, og tað sama er galdandi við størri ábyrgd til kommunurnar.

Spurd, hví flokkurin ikki kemur við eini alternativari fíggjarlóg, ið vísir eitt yvirskot, sigur Tjóðveldisflokkurin:

- Um vit høvdu havt tí almennu umsitingina og alla skipanina í rygginum, høvdu vit ivaleyst kunnað farið meiri gjølla inn á summi øki og spart nakað væl afturat, men tað fáa vit ikki gjørt í verandi støðu, sigur flokkurin.

# Ófyrireikaðar einskiljingar

**Tað fellur ikki í góða jørð í Tjóðveldisflokkinum, at samgongan inntøkuførir milliónaupphæddir, sum koma í sambandi við væntaðar einskiljingar og almennar sølur**

FÍGGJARLÓGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Páll á Reynatúgvu helt vegna Tjóðveldisflokkin, at tað er skeivt av landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Bárði Nielsen, at inntøkuføra milliónaupphæddir frá møguligum einskiljingum og almennum sølum í fíggjarlógaruppskotið, tí tær eru ikki nóg væl fyrireikaðar enn.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í fíggjarlógaruppskotinum, sum í hesum døgum verður viðgjørt í tinginum, hevur samgongan roknað við inntøkum frá einskiljingum og almennum sølum, og tað heldur Tjóðveldisflokkurin verða burturvið.

### Skuldi heldur farið í grunn

- Tær einskiljingar, sum liggja í kortunum, eru púrasta ófyrireikaðar, og tað er burturvið at seta inntøkur frá teimum á fíggjarlógina, tí eingin veit við vissu, um tær verða veruleiki í komandi ári. Um so var, at tær vóru komnar so langt, at tað bert manglaði politiska góðkenningin, so var tað eftir okkara tykki kanska í lagi at inntøkuføra tær, heldur Páll á Reynatúgvu, framsøgumaður flokksins í fíggjarmálum.

Páll á Reynatúgvu vísti tó á, at flokkurin heldur tað verða skeivt at inntøkur frá møguligum sølum av almennum ognum verða nýttar til raksturin á fíggjarlógini. Tjóðveldisflokkurin er av teirri fatan, at rættast hevði verið at sett inntøkurnar frá slíkum sølum í ein búskapargrunn, sum flokkurin hevur lagt uppskot fram um.

# Kenna nógv aftur

**Í fíggjarlógaruppskotinum hjá samgonguni eru fleiri ting, ið Tjóðveldisflokkurin sigur seg kenna aftur frá tíðina, tá ið flokkurin sat í samgongu saman við Fólkaflokkinum, Miðflokkinum og Sjálvsstýrisflokkinum, og sum tá varð stungið út í kortið. Hetta fegnast flokkurin um**

FÍGGJARLÓG
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum dømi um hetta nevnir flokkurin uppskotið um at leggja barsilsskipanina út til arbeiðsmarknaðin, og eisini at kommunurnar fáa størri og størri ábyrgd á eldraøkinum.

- Vit høvdu uppskotið um at leggja barsilsskipanina út til arbeiðsmarknaðin fyri fleiri árum síðani, og vit fegnast um, at samgongan nú hevur tikið tað til sín, sigur flokkurin.

Eisini hevur samgongan ætlanir um at umfíggja landskassaskuldina, og tað sigur Tjóðveldisflokkurin eisini verða eitt av sínum børnum, sum sitandi samgonga hevur ættleitt, sum tikið verður til.

- Vit kunnu hóast alt staðfesta, at hetta eru nógv av okkara børnum, ið nú eru farin til gongu, og tí herja vit ikki so øgiligt á í kjakinum um fíggjarlógina, sigur Tjóðveldisflokkurin og vísir á, at nógv tær flestu íløgurnar hjá samgonguni eru frá raðfestingini hjá flokkinum í 1999.

# Sungu fyri Tobba

Í sambandi við tíðindafundin á gamla Apotek fríggjamorgunin, tá ið Tjóðveldisflokkurin legði fram sína alternativu fíggjarlóg, byrjaðu tinglimir flokksins fundin við at syngja føðingardagssang fyri Torbjørn Jacobsen, løgtingsmanni. Tobbi fylti 50 ár fríggjadagin, men tað forðaði ikki honum í at taka lut í politiska arbeiðinum á føðingardegnum.

**tn**

